# Hugni á Lágargarði

**Fyrsta hugnakvøldið í árinum, er turrur fiskur, turr grind og spik á skránni á Lágargarði - aftur við Ad Libitum**

LÁGARGARÐUR
*Turið Kjølbro*



*Eitt av búfólkunum á Lágargarði, Oda Hansen, saman við ommudóttrini 9 ára gomlu Duritu*

*Mynd: Jan Müller*

Síðani Lágargarður læt upp í áttatiárunum, hevur verið skipað fyri regluligum hugnaløtum fyri búfólkunum á stovninum. Ein slík var týskvøldið fyri eini viku síðani. Avvarðandi vóru boðin við. Borðreitt varð við turrum fiski, turrum tvøsti og spiki, sum familjan hjá búfólkunum høvdu útvegað. Stovnurin bjóðaði drekkamunn omaná.

– Hetta er fastur siður á hvørjum ári í januar, at vit skipa fyri hugnaløtu við góðum føroyskum mati og undirhaldi við Ad Libitum. Teir spæla lættan, klassiskan tónleik, sum øllum dámar væl og kenna. Harmonikan er eisini við hetta kvøldið.

– Tað ber altíð til at fáa fatur á turrum fiski. Verri er at skaffa turra grind og spik. Men eg veit, at fólk hava verið í Suðuroy eftir grind og spiki, sigur Marjun Smith, leiðari á Lágargarði.

Á hugnaløtunum sita avvarðandi hjá búfólkunum. Borðkort er til hvønn einstakan. Til eitt sovorðið hugnakvøld eru eini 120-130 fólk tilsamans.

– Tey gomlu síggja avgjørt fram til hesi kvøldini. Eisini tey avvarðandi, og vit merkja nú, vit hava skipað fyri hesum kvøldum í so nógv ár, at fólk kennast væl og dámar at koma her.

### Stendur nógv á

Alla vetrarhálvuna, tó uttan í oktober, verður skipað fyri hugnakvøldum á Lágargarði. Á hugnaløtuni í februar kemur sum vera man á hvørjum ári eitt dansifelag á gátt. November og januar hugnakvøldini er føroyskur matur á skránni, meðan tað hini kvøldini verður borðreitt við einum drekkamunni.

Til undirhalds dámar teim gomlu best sang, felagssang og tónleik.

– Tey á Kamarinum, Harmonikumenninir, Spælimenninir í Hoydølum og onnur hava vitjað okkum. Og tað stendur nógv á hjá nógvum at sleppa út á gólvið til ein dans, men tíverri eru tey fægstu før fyri tí, sigur Marjun Smith.

### Útferð í mai

Í mai mánaði á hvørjum ári verður skipað fyri útferð fyri búfólkini.

– Vit hava verið nógva ymsa staðni við okkara búfólkum. Tað er ongantíð meiri enn ein dagstúrur. Av teim 48 fólkunum, sum búgva á Lágargarði, er ikki meir enn ein triðingur førur fyri at koma við eina slíka ferð og tilsvarandi líka nógv starvsfólk mugu við. Vit eta á einum hotelli ella gistingarhúsi, og er ellisheim í økinum, vitja vit har til ein drekkamunn og eitt prát, sigur Marjun Smith.



*Til hugnakvøldini á Lágargarði taka eini 120-130 fólk lut*

*Mynd: Jan Müller*

# Ongin skal sleppa at skáka sær undan

**Nú er lagnan hjá nýggja vaktar- og bjargingarskipinum, Brimli, aftur óviss**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*




*Síðani uppskotið um lønina hjá manningini á Brimli varð lagt fyri tingið, eru einstakir tinglimir úr samgonguni farnir at draga í land aftur. Men tað góðtekur Karsten Hansen ikki*

Nú hevur aftur óvissa tikið seg upp um lagnuna hjá nýggja vaktar- og bjargingarskipinum, Brimli.

Annars tóktist tað, sum um at tað loksins skuldi eydnast at fáa hann til landið, nú Karsten Hansen tíðliga í farnu viku legði uppskot fyri Løgtingið um at gera enda á ósemjuni um lønina hjá manningini.

Ætlanin var, at ein seks mannanevnd skuldi setast at áseta lønina. Nevndin fekk freist til 1. mai, men manningin skuldi kortini fara umborð, beinanvegin lógin var komin í gildi.

Tað vil siga, at gekk sum ætlað, hevði Brimil komið til landið fyrsta dagin.

Men tað gekk ikki sum ætlað.

Uppskotið skuldi koma til 1. viðgerð fríggjadagin, men tá bað Karsten Hansen um at fáa tað tikið av dagsskrá.

Og nú er óvist, nær tað kemur til viðgerðar.

Orsøkin til, at uppskotið ikki kom til viðgerðar, er, at onkrir limir í samgonguni eru farnir at draga í land aftur, eftir at tað annars var semja um, at málið skuldi leggjast fyri tingið.

Tað skilst, at tað er harðliga mótmæli frá Starvsmannafelagnum, sum hevur fingið onkrar tinglimir í samgonguni at ivast í, um tað er rætt at leggja upp í ósemjuna.

Starvsmannafelagið hevur víst á, at tað er ikki farið í arbeiðssteðg, men at tað samráðist enn við Fíggjarmálastýrið.

Tí kann tað undir ongum umstøðum góðtaka, at viðurskiftini hjá teimum av manningini á Brimli, sum eru limir í Starvsamannafelagnum, verða løgd fyri tingið. Og hendi tað, blivu tiltøk sett í verk.

Og tað hevur nú fingið onkrar tinglimir í Samgonguni at ivast so mikið, at fyribils er málið tikið av dagsskrá hjá Løgtinginum.

### Ongin skal skáka sær undan

Karsten Hansen vil ikki rættiliga viðganga, at samgongulimir eru farnir at draga í land.

Hann sigur, at tað er rætt, at onkrir tinglimir í samgonguni vilja hava svar uppá nakrar spurningar og tí er málið útsett.

– Sannleikin er helst tann, at tingmenn vilja helst sleppa undan at koma upp í málið. Og tað skilji eg væl, tí eg vildi eisini sloppið undan at lagt málið fyri tingið. Men tað er rætt og slætt ómøguligt at koma víðari við samráðingum og tí kunnu tinglimir verða noyddir at taka støðu.

Karsten Hansen sigur, at veruleikin er, at eftir tilboðnum, sum t.d. maskinmenninir fingu, høvdu teir um eitt ár fingið eina løn, sum er hægri enn kravið, teir hava sett, tá ið eftirløn og annað, er roknað uppí. Men tá er tað eisini talt uppí, at teir høvdu fingið lut í teimum lønarhækkingum, sum verða í teimum vanligu samráðingunum. Samstundis ger landsstýrismaðurin vart við skattalættan, sum er komin.

Hann leggur afturat, at hann bjóðað bæði maskinmeistarunum á Brimli og á Tjladrinum hesa lønarhækkingina.

– Tí er tað tað mær ein gáta, hví teir ikki tóku av. Ístaðin eru teir komnir við nýggjum krøvum, sum t.d. hava teir nú kravt, at teir skulu hava løn ímeðan teir hava verið í verkfalli.

– Eg skal ikki siga, at málið eg gjørt politiskt. Men í øllum førum stríðir tað ímóti øllum vanligum viti og skili.

Karsten Hansen sigur, at tá ið tað ikki ber til at koma longur við samráðingum, slepst ikki undan, at leggja málið fyri tingið, tí málið skal loysast.

Men hann hevur alla tíðina gjørt greitt, at málið verður ikki lagt fyri tingið, uttan at øll samgongan bindur seg til at atkvøða fyri tí.

– Eg góðtaki ikki at einstakir tinglimir í samgonguni skáka sær undan ábyrgdini í hesum málinum.

Hann sigur, at orsøkin til, at Starvsmannafelagið er tikið uppí, er, at hann vil loysa málið sum eina heild.

Hann er ikki samdur við Starvsmannafelagið í, at ongar samráðingar hava verið við felagið um manningina á Brimli.

– Tað hava verið fleiri fundir, men vit eru ikki komnir nakran veg. Og nú hevur ósemjan vart so leingi, at tað er neyðugt at loysa tað sum eina heild. Vit mugu ikki koma í ta støðu nú, at dekkararnir og kokkarnir, sum eru í Starvsmannafelagnum, fara í land, samstundis sum yvirmenninri fara umborð, sigur Karsten Hansen.



# Ótrúverdigur Føroyapolitikkur

**Vandi er fyri, at Danmark kemur í altjóða andglettin, um stjórnin fer ov harðliga fram móti nýggju sjálvstýrisætlanini hjá landsstýrinum, heldur Frederik Harhoff, serfrøðingur í ríkisfelagsskapinum**

FRAMTÍÐARSTØÐA FØROYA
*Magnus Dam*



*Danski serfrøðingurin í fólkarætti, Frederik Harhoff, ávarar donsku stjórnina um at fara ov harðliga fram móti landsstýrinum. Vandi er fyri, at onnur lond fara at finnast at Danmark*

Ein av teimum, sum hevur størst innlit í viðurskiftini í ríkisfelagsskapinum, Frederik Harhoff, ávarar nú beinleiðis donsku politikkararnar ímóti at vraka sjálvstýrisætlanina hjá landsstýrinum.

Serfrøðingurin í fólkarætti heldur, at umdømið hjá Danmark kann líða stóran skaða, um stjórnin vísir ætlanini frá sær og ikki vísir vilja til at samstarva um nýggju ætlanina. Við Berlingske Tidende í gjár segði Frederik Harhoff, at Danmark stýrir beint móti einum altjóða samanbresti, um stjórnin heldur fram við førda Føroya-politikkinum.

Frederik Harhoff heldur ætlanina hjá landsstýrinum vera skilagóða, og at danskir politikkarar eru óærligir, tí teir alment siga seg góðtaka eitt ynski úr Føroyum um meira sjálvstýri, men kortini leggja fót fyri føroysku ætlanini.

– Stjórnin hevur biðið landsstýrið um at vera greiðari og at fáa eitt styrkt mandat. Tá ið landsstýrið so ger eftir boðunum, er hetta eisini skeivt. Tað haldi eg vera ótrúverdugt, sigur Frederik Harhoff.

Gerst støðan spentari millum Føroyar og Danmark, so kann hetta koma illa við hjá Danmark, heldur hann. Hann sær fyri sær, at hini norðurlondini, Bretland, USA og Kanada fara at finnast at Danmark.

– Londini fara at hyggja undrandi at donsku handfaringini, sum er í stríð við danskan mentalitet. Vit hava ikki siðvenju fyri at reka uttanríkispolitikk eins og fransmenn, sigur Harhoff við Berlingske Tidende.

### Vísa ætlanini aftur

Fyrstu útmeldingarnar frá donskum politikkarum benda á, at nýggja ætlanin hjá landsstýrinum ikki treytaleyst fær undirtøku í Fólkatinginum. Sambært ætlanini skulu Føroyar fáa blokkstuðul fram til 2012, tá ið atkvøðast skal um loysingina, og hetta fellur ikki í góða jørð í Danmark.

Donsku politikkararnir halda, at landsstýrið við hesari ætlanini roynir at »snýta« seg til eina longri skiftistíð enn tey 3-4 árini, sum stjórnin er sinnað at lata.

– Tað ber ikki til at bestilla blokkstuðul í so og so nógv ár úr Danmark. Hava føroyingar ráð til at leggja eina hálva milliard krónur í ein grunn, so skulu teir ikki hava pengarnar, sigur Pia Larsen, framsøgukvinna hjá Vinstra, sum leggur afturat, at danskir politikkarar hava sínar egnu veljarar at hugsa um.

# Fólkaatkvøðan fyri tingið um tvær vikur

**Lógaruppskotið, sum Føroyingar skulu taka støðu til á fólkaatkvøðu í mai, er klárt. Kortini verður tað ikki borið í tingið fyrr enn um tvær vikur, fyri at møguleiki skal vera at gera smáar broytingar**

FÓLKAATKVØÐAN
*John Johannessen*

Bundni leisturin fram at fullveldinum, sum landsstýrið almannakunngjørdi hóskvøldið, er til í lógarsniði. Men kortini verður lógaruppskotið ikki latið løgtingsskrivstovuni fyrr enn um tvær vikur ella so.

Orsøkin til hetta er, at landsstýrið ynskir at hava møguleika at gera smáar broytingar í lógartekstinum, um hetta gerst neyðugt. Og møguliga gerst hetta eisini neyðugt, tí ivi hevur verið reistur um, hvørt tað ber til at staðfesta sum grein í eini lóg, at hon ikki kann broytast aftur tey næstu 12 árini.

Lógaruppskotið um stuðul til fólkaatkvøðuna er enn ikki liðugt politiskt viðgjørt í landsstýrinum. Men væntandi kemur hetta eisini fyri tingið um tvær vikur ella so.

Samlaði stuðulin til fólkaatkvøðuna fer helst at tátta í tvær milliónir krónur. Møguleiki verður hjá politiskum flokkum og felagsskapum, ið siga ja ella nei til fólkaatkvøðuna, at fáa stuðul. Ein óheft nevnd ger av, hvør fær stuðul til upplýsing undan fólkaatkvøðuni.

Nýtt føroyskt rit:

# Skal viðgera føroyskar lógarspurningar

**Eitt felag við ungum løgfrøðingum og stjórnarkønum hevur tikið stig til at geva út eitt føroyskt lógarrit, sum skal lýsa og viðgera føroyskar lógarspurningar og siðvenjur**

LØGFRØÐI
*John Johannessen*



*Løgfrøðingurin Kári á Rógvi er ein av høvuðsmonnunum aftan fyri Føroyskt Lógar Rit*

Kann løgmaður hetta? Kann landsstýrismaðurin hatta? Hvørji mørk setur stýrisskipanarlógin fyri hesum og hasum?

Slíkir spurningar verða dagliga viðgjørdir í føroysku miðlunum, og svarini eru ofta ymisk og ógreið.

Tí heldur eitt felag við ungum løgfrøðingum og stjórnarkønum tað vera hóskandi at geva út eitt føroyskt lógarrit, sum gjølligari viðger síkar spurningar.

### Stórur tørvur

Felagið, ið kallast Føroyskt Lógar Rit, sigur í tíðindaskrivi, at tørvurin á einum lógarriti er stórur. Føroyar hava altíð verið egið løgdømi við egnum lógum og dómum. Talið av lógum, dómum og avgerðum, ið bert hava gildi í Føroyum, er stórt. Og við nýggju stýrisskipanini eru nú lógir, ið bert eru skrivaðar á føroyskum.

Limirnir í felagnum Føroyskt Lógar Rit halda, at trupulleikar og óvissa standast av, at hvørki lýsing av mannagongdum alla ástøðilig viðgerð fer fram innan føroyska lóg.

– Almennar avgerðir eiga at koma á prent, tí tær hava týdning, um vit til fulnar skulu skilja rættarstøðuna. Í flestu lógum eru spurningar um tulking, sum kunnu avgerðast á ymsan hátt. Bert við at kenna avgerðir – serliga frá kærunevndum og dómstólum – kunnu vit til fulnar siga, hvør rættarstøðan er, siga løgfrøðingarnir í tíðindaskrivinum.

### Ymiskt tilfar

FLR, sum er styttingin fyri Føroyskt Lógar Rit, fer at innihalda fleiri sløg av viðgerðum. Í ritinum fara at vera ástøðiligar viðgerðir, lýsingar av siðvenju umframt fastir tættir av ymsum slag.

Lógarritið kemur væntandi út tríggjar ferðir um árið, á vetri, vári og heysti. Fyrsta ritið er evnisrit um fólk og fullveldi.

– Nógvir óloystir spurningar eru viðvíkjandi støðu Føroya. Gjørdust vit nakrantíð partur av Noreg ella Danmark? Eru Føroyar eitt land, føroyingar eitt fólk ella tjóð? Hava vit ræði á egnum landi, ella eiga vit rættin at fáa tað, ella er rætturin farin fyri bakka? Ber tað til at vera land og fólk og framvegis vera innan fyri ein størri valdskam, spyr Føroya Lógar Rit í tíðindaskrivi.

### Almennur fundur

Føroya Lógar Rit byrjar orðaskifti sítt við trimum greinum, sum ávikavist Halgir Winther Poulsen, Guðmundur Alfredsson og Alasdair Geater og Scott Crosby hava skrivað. Av hesum fara Halgir Winther Poulsen, Alasdair Geater og Scott Crosby at greiða frá greinum sínum á almennum fundi, sum verður í Fiskirannsóknarstovuni í Nóatúni í Havn hósdagin 8. februar.

Halgir Winther Poulsen spyr í grein síni, um Føroyar eru tjóð, og lýsir fyri-litini í altjóða lóg, ið gera av hendan spurning. Guðmundur Alfredsson nemur við, hvat tað merkir at vera tjóð í samráðingarhøpi. Alasdair Geater og Scott Crosby viðgera sjálvsavgerðarrættin bæði í nútíðar og søguligum høpi. Serliga nema teir við, hvønn týdning felagsskapir sum ES hava fyri sjálvsavgerðarrættin hjá smáum londum og tjóðum.

Kári á Rógvi, løgfrøðingur, samskipar arbeiðið hjá felagsskapinum Føroyskt Lógar Rit.